VINNU SÍÐURNAR
VINNA HANDVERK HANDIL

Nr. 189 • mikudagur • 5. oktober 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

Chevron satsar uppá Føroyaøkið:

# 100 mió. til seismiskar kanningar



*Seamus Reilly, leiðari fyri leiting hjá Chevron á Atlantsmótinum (uttast til høgru) saman við Masrtin Kirkham, skattaráðgeva hjá felagnum og føroyska umboðsmanninum, Halgir W. Poulsen*

*Mynd Jan Müller*

**So mikið stórar vónir hevur oljufelagið Chevron til Atlantsmóti og harvið eisini Føroyaøkið, at tað í summar setti í gongd eina ta mest kostnaðarmiklu og framkomnu seismisku kanning nakran tíð á landgrunninum. Hon er mett at kosta einar 100 mio. kr. og skal fevna um øll sjey loyvini, sum felagið hevur á Atlantsmótinum, harav eitt loyvi er við Føroyar**

OLJULEITING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Ein av heimsins oljurisum, amerikanska oljufelagið ChevronTexaco er nú av álvara farið at fyrireika seg til at bora sín fyrsta brunn á føroyska landgrunninum nakrantíð. Í summar hevur felagið skipað fyri seismiskum kanningum á sínum loyvum í føroyska økinum, um somu tíð sum seismiskar kanningar eru gjørdar á loyvunum hinumegin markið, eitt nú á Rosebankfundinum. Nú um dagarnar vitjaðu tvey umboð fyri Chevron Oljufyrisitingina, har tey greiddu frá fyribils úrslitinum av seinastu kanningunum og gjørdu status yvir teirra virksemi á landgrunninum. Eisini vóru stig tikin til at lata upp skrivstovu í Havn.

Seamus Reilly stendur á odda fyri arbeiðinum hjá Chevron á Atlantsmótinum tvs. bæði føroyska landgrunninum og øllum tí stóra økinum vestan fyri Hetland. Hann er íri og hevur arbeitt í oljuvinnuni seinastu 20 árini, megin-partin av tíðini fyri Chevron. Aftrat honum var eisini Martin Kirkham við í Føroyum. Hann er skattaráðgevi hjá felagnum.

– Vit hava gjørt okkum stóran ómak við at fáa til vega og brúka ta mest nútímans og mest framkomnu tøknina innan 2 D seismikk og hava skotið seismikk á føroyska og hetlendska landgrunnunum á tilsamans sjey loyvum hjá felagnum, seks á bretskum øki og so tað eina á føroyaleiðini vísir Seamus Reilly á. Her arbeiðir Chevron saman við nógvum øðrum feløgum, eitt nú OMV, DONG, Mærsk, Statoil, Føroya Kolvetni og Talisman. Tað er Western Geco, sum hevur staðið fyri seismisku kanningunum.

Chevron hevur so brúkt tænastur frá Atlantsflog, meðan teir hava arbeitt í føroyskum øki í summar. – Vit eru sera væl nøgdir við tað arbeiði, sum fólkini hjá Atlantsflogi hava gjørt fyri okkum. Hetta hevur verið professionelt og hava okkara fólk kent seg sera væl og trygg í hondunum hjá føroyska flogfelagnum sigur Seamus Reilly og sipar her til teir mongu túrarnar, sum tyrlurnar hjá Atlantsflogi hava gjørt millum seismikkskipini og flogvøllin í Vágum. Chevron fer at leggja seg eftir at brúka føroyskar vørur og tænastur í framtíðini .

Írski Chevronstjórin er eisini sera væl nøgdur við fund teirra við leiðaran á Oljufyrisitingini, Sigurð í Jákupsstovu. – Eg haldi eisini, at hann var nøgdur við fundin, nú vit hava livað upp til okkara forpliktilsi á landgrunninum, har vit longu eftir góðum sjey mánaðum hava gjørt tær kanningar, sum vórðu avtalaðar at gera innan fyri eitt tvey ára tíðarskeið.

Uppá fyrispurning hví teir hava skundað sær við hesum kanningum sigur Seamus Reilly, at tað hevur týdning fyri teir at fáa sum mest av upplýsingum um alt økið (báðumegin markið, blaðm.), nú teir hava gjørt eitt fund á Rosebankleiðini í bretskum øki og skulu til at bora avmarkingarbrunnar næsta summar. Boripallurin Transocean Rather skal bora hesar brunnar í næsta ársfjórðingi í 2006.

### Bora í Føroyum í 2007!

Vit spurdu Seamus Reilly, nær teir fara at bora á føroyskum øki. Hann sigur, at tað er torført at siga nakað um føroysku undirgrundina nú. Fyrst mugu teir tulka allan seismikkin lidnan. Tað arbeiði er í gongd. Teir verða so eisini nógv upptiknir av at bora teri tríggjar brunnarnar á Rosebank feltinum hinumegin markið næsta summar. Vitanin teir fáa frá teimum brunnunum kann so eisini verða hent, tá farið verður undir miðvísar boriætlanir á Føroyaøkinum. – Vit hava stórar vónir til okkara loyvi á føroyska landgrunninunum, men vit mugu tulka seismikkin og eisini síggja úrslitið av brunnunum hinumegin markið, áðrenn vit kunnu siga nakað um, nær vit bora okkara fyrsta brunn við Føroyar. At vit hava brúkt so nógva orku og gjørt arbeiði so skjótt bæði hvat seismikkinum á Føroyaøkinum og stóru boriætlanini á Rosebankfundinum er so ein ábending um, hvat vit hugsa.

*Framhald á næstu síðu*